## DAGSINS MEINING

# Demokratiskt orðaskifti

Hvat hava blaðtekningar við almenna orðaskiftið at gera? Hava skemtitekningar nakað við fólkaræðið at gera? Eru karikaturar ikki mangan eitt slag av almennari happing, har tað er so at siga er legalt at gera gjøldur burtur úr samfelagsins oddamonnum- og kvinnum? Er blaðtekningin list? Er tíðin ikki farin frá hesum formi fyri samfelagsviðmerking? Blaðtekningin reisir nógar spurningar. Hesir spurningar hava ikki nøkur einføld svar. Tað velst alt um, hvør, ið teknar, og hvussu tekingin verður nýtt – hvat evnið er og í hvørjum høpi, ið tekningin stendur í. Vit hava ikki øll svarini her, men skulu loyva okkum at stutt at hugleiða eitt sindur um evni, nú stór framsýning við blaðtekingum letur upp í Norðurlandahúsinum leygardagin - og panelorðakiskifti er í Miðlahúsinum í kvøld um sama mál.

Blaðtekningin – karikaturin, er eitt aldargamalt fyribrigdi. Vit kundu lagt afturat, at hesin formur er og hevur altíð verið sera vældámdur í almenninginum. Men tað má samstundis ásannast, at blaðtekningin mangan kann vera ein rættiliga bonskur formur fyri viðmerking. Sæð í søguligum høpi mugu vit samstundis ásanna, at tann góða blaðtekningin hevur verið ein sera týðandi partur av fólkaræðiliga samfelagnum og fólkaræðiliga orðaskiftinum. Vit siga við vilja tann góða tekningin, tí fólk flest vita, at ein tekning, eins væl og skrivaða orðið, kann misbrúkast. Sum øll amboð kann blaðtekningin misnýtast og tíverri hava vit upp gjøgnum tíðina sæð nógv dømi um blaðtekningar nýttar til at niðurgera ávísar samfelagsbólkar og ávísar rasur. Men hetta er tíbetur fyribrigdi, sum bert kemur fyri í nazistiskum og facsistiskum samfelagsskipanum. Hetta kemur ikki fyri og eigur ikki at koma fyri í demokratiskum samfelagi. Tí tala vit um ta góðu blaðtekningina, sum eggjar til demrokatiskt orðaskifti og sum varpar ljós á skeivleikar, ið kunnu og skulu rættast við demokratiskum miðlum og demokratiskum tilgongdum.

Tann góða blaðtekningin er eitt sera týðandi og eitt ómissandi íkast til samfelagsorðaskiftið og harvið til demokratiska orðaskiftið. Við tekningini kann ofta verða sagt meira enn sagt verður við skrivaða orðinum. Tekningin megnar at seta fokus á fyribrigdi og á viðurskifti, ið mangan eru torfør fyri ikki at siga ómøgulig at lýsa í teksti. Hartil kemur, at tekningin ofta er eitt sera týðandi íkast til ein tekst. Blaðtekningin er eitt gamalt demokratiskt amboð. Tað er væl kent, at einaræðisharrarum dámar ikki blaðteknarar. Blaðteknarar fáa fólk at flenna – einaræðisharrum dámar ikki at flent verður ov nógv. Láturin er sum kunnugt eitt hitt sterkasta vápnið. Blaðtekningin er sostatt ein sera týðandi partur av demokratiska orðaskiftinum, ein partur, sum vit ikki kunnu vera fyri uttan. Her í Føroyum hava vit í mong ár havt Óla P., sum nú er farin um tey sjeyti. Miðlahúsið markerar hetta við eini norðurlendskari framsýning av blaðtekningum. Endamálið er ikki bert at fagna Óla P., men eisini hetta, at seta ljóskastaran á ein týðandi og ómissandi part av almenna orðaskiftinum í einum demokratiskum samfelagi. Vit takka Norðurlendska Mentanargrunninum, Dansk Føroyska Mentanargrunninum, Norðurlandahúsinum, Politiken Grunninum, BP og Atlantic Airways fyri at hava stuðlað tiltakinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Frustratiónir Tjóðveldisfloksins

POUL MICHELSEN
løgtingsmaður



**Bleiv eitt sindur skakkur henda dagin, tá Torbjørn Jacobsen – umvegis ein fyrispurning til Jógvan á Lakjuni – legði eina heildarætlan fyri framtíðar skúlabyggingum í Føroyum**

Slíkar ætlanir eru jú altíð vælkomnar, og eiga at verða viðgjørdar javnan.

Tað sum gjørdi meg skakkan, var »timingin«, og at ætlanin stóð andsøgn til allar tær politisku telvingarnar, sum í seinastuni hava verið innan skúlabyggingar í Føroyum.

Men Torbjørn er nú einaferð Torbjørn, og orðatakið »sum fílur í eini glasbúð« fellur lættast á sinni.

Men nú traðkar næsti maður á Tjóveldislistanum fram og bakkar upp! Finnur Helmsdal valdur í Suðurstreymi hevur somu áskoðan sum Torbjørn. Niðurlegg tekniska skúla í Havn og flyt hann til Klaksvíkar!

Nú líkist hetta einum floksmáli meira enn einum Tobba-syndromi.

**Tekniski skúli í Havn**

Í meira enn 30 ár hevur tekniski skúli í Havn liðið undir illvilja løgtingsins. Skúlin hevur snøgt sagt havt allar ringastu umstøður. Nógvar royndir hava verið gjørdar hesi nógvu seinastu árini fyri at betra umstøðunar hjá skúlanum – men nei!

Hetta hóast at skúlin í øll árini hevur havt góða og mennandi útbúgving til ta handverksvinnuna, sum eigur, og altíð hevur átt sítt høvuðvirksemi í Havn. Tað er í Havn, at handverksvinnan eigur sítt grundstøði – tað er í Havn, at handverksmetropolurin er, og tað er her næmingarnir virka og halda til.

Men skúlin skal allur liggja í Klaksvík?

**Svik Tjóveldisflokksins**

Fyri góðum tveimum árum síðan kom eitt uppskot frá Sambandsflokkinum um at veita Handilsskúlanum og Tekniska Skúla í Havn fígging til skúlabygging eftir vinnuskúlalógini. Ætlanin var tá at byggja ein minni skúladepil úti í Marknagili, sum skuldi húsa hesum báðum skúlunum.

Uppskotið var gott, og hóast Sambandsflokkurin var í andstøðu, ætlaði eg mær – saman við Javnaðarflokkinum – at atkvøða fyri uppskotinum.

Her var endiliga ein møguleiki at koma eitt fet víðari í skúlabyggimálinum.

Tjóðveldisflokkurin var ikki fegin um hesa ætlan mína. Høgni Hoydal helt, at besta loysnin var at finna í einum skúladepli, sum umframt at skula hýsa handils- og tekniskum útbúgvingum, eisini skuldi hýsa studentútbúgvingini og HF-skeiði. Skúlavirksemi í Hoydølum skuldi so flytast í Marknagil.

Mær hevur altíð dámt ætlanina um at byggja ein skúladepil í Marknagili – ein depil, sum hýsir eini fjølbroyttari frálæru og sum er eitt gott boð upp á framtíðarinnar skúla.

Í teirri trúgv at Tjóðveldisflokkurin stóð aftan fyri skúladepilin í Marknagili, og at politiska baklandið aftan fyri skúladepilin tí var rættiliga trygt, valdi eg so at stuðla hesi ætlan heldur enn at taka undir við uppskotiðnum hjá Sambandsflokkinum um eina loysn fyri Handilsskúlan og Tekniska Skúlan.

Nú er so sjón fyri søgn – Tjóðveldisflokkurin er als ikki aftan fyri skúladepilsætlanina í Marknagili – í hvussu so er ikki ein depil, sum hýsur tekniska skúla í Havn – hann – samb. Torbjørn Jacobsen og Finnur Helmsdal skal flytast til Klaksvíkar.

**Tíbetur er málið komið aftur á beint**

Eg eri sera harmur um, at ætlanin um at byggja skúladepilin í Marknagili ikki gerst veruleiki á hesum sinni.

MEN eg kann staðfesta, at hetta skyldast at Javnaðarflokkurin ogTjóðveldisflokkurin IKKI taka undir við ætlanini, og tá er ætlanin ikki borðbar longur.

Hinvegin eri eg sera fegin um, at samgongan stendur aftan fyri lógaruppskot nr 112, sum landsstýrismaðurin í mentamálum legði fyri tingið herfyri. Uppskotið játtar Handilsskúlnum og Tekniska Skúla í Havn fígging til at byggja eina skúlabygging fyri 150 mill, og at ætlanin hýsir møguleikanum hjá Studentaskúlin í Hoydølum at byggja seg inn í ætlanina seinri.

Handlisskúlin og Tekniski Skúli í Havn fáa nú virðiligar karmar og sostatt eisini høvi at mennast útbúgvingarliga og gerast týðandi lutir í framtíðar útbúgvingarpolitikki samgongunar.

**Frustratión**

Helt at tramanskapur Tjóðveldisflokksins í deplamálinum í Marknagili helt uppat í royndini at forkoma teknisku útbúgvinginin í Havn. Men nei !

Nú undirmáar Anita á Fríriksmørk og Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum so sanniliga lógina um vinnuskúlabygging (løgtingslóg nr106 frá 1998) við at halda uppá, at lógin er óforsvarlig, og hevur til endamáls at fremja kaos í fíggjarstýringin.

Sjálvur haldi eg, at lógin um fígging av vinnuskúlum er væl brúkulig. Fyri tað fyrsta er lógin bert galdandi fyri sjálvseigandi vinnuskúlar. Hesir skúlar eru sera avmarkaðir og tí ongin trupulleiki at halda skil á. Fyri tað næsta, so er roknistykkið sera einkult – talan er um at seta eina ávísa upphædd av á fíggjarlógini í eitt ávíst áratal t.v.s áratal ganga upphædd – er hetta so trupult at rokna út?

Roknistykkið kann ikki vera trupulleikin! Talan er allarhelst um stórar frustratiónir nú skúlanir í Marknagili fáa nøkta sín tørv? Og dupultspælið hjá Tjóðveldisflokkinum í skúladeplinum í Marknagili er avsløraõ?

**Uppskotið hjá Torbirni Jacobsen**

Hvat viðvíkur uppskotinum hjá Torbirni Jacobsen um at endavenda øllum skúlabyggiætlanum, so taki eg als ikki taki undir við uppskotinum.

Eg eri í prinsippinum fyri, at skúladeplar vera í øllum størri økjum í Føroyum.

Deplarnir skulu kunna bjóða nær um øll tilboð innan miðnámsútbúgvingar. Møguliga er hetta ikki bíligasti skúlarakstrarháttur, men hinvegin so verður hvør undirvísingargrein væl røkt í kappingini millum skúlarnar. Næmingarnir kunnu í sínum heimliga skúladepli velja tær útbúgvingar, sum teimum dáma best og ikki velja eina útbúgving bert tí at hon er einasta útbúgvingin, sum hevur at bjóða.

Eg ivist tó í, um skipanin við økisskúlum við fjølbroyttum tilboðum er dýrari skipanin enn hon sum savnar undirvísingina í serskúlar har næmingarnir skulu fjakka á úr egnum øki til annað fyri at nema sær útbúgving.

Ongin regul uttan undantak – tað finnast undirvísingar, sum eru so avmarkaðar, at rættast er at savna hesa á ein skúla.

Eitt er tó víst – at ein økisskúli við fjølbroyttum undirvísingartilboðum, verður ein kraftdepil í økismenningini og størsta trygdin undir lokala trivnaðinum.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.